# FCK spældi seg víðari

FCK spældi í gjár seinna dystin í 2. rundu av Champions League-kvalifikatiónini, og her skuldu teir royna at verja eina 1-0 leiðslu frá heimadystinum í Keypmannahavn á útivølli ímóti ísraelska meistaraleiðnum, Beitar Jerusalem. FCK megnaði at halda 0-0 allan fyrra hálvleik, men tá ein tími var spældur legði Yitzhaki Beitar á odda, og restina av hálvleikinum brendi á framman fyri málið. FCK helt tó fast, og í umdystinum fekk danska liðið týdningarmikla útivallarmálið, sum avgjørdi dystin, tá Marcus Allbäck var uppá spæl. Dysturin endaði við javnleiki 1-1, og sostatt spældi FCK seg víðari í kappingini.



# Gordon ávegis til Sunderland

Slaturin hevur leingi gingið um, at skotski landsliðmálmaðurin, Craig Gordon, var ávegis til ensku Premier League. Uppflytararnir úr Sunderland hava ligið fram við leingi, og nú er líkt til, at stríðið hjá teimum hevur givið úrslit. Sum skilst á enskum miðlum, so hevur Gordon gjøgnumgingið ta obligatorisku læknaroyndina og fingið síni persónliga viðurskifti upp á pláss, og hann skiftir væntandi endaligt seinni í dag. Sunderland skal eftir øllum at døma gjalda góðar 100 mió. kr. fyri málmannin, sum sostatt er dýrasti málmaður í bretskari fótbóltssøgu.

# Leikari sligin í Vági

**Sendingin 3-2 hjá Sjónvarpinum vísti í gjár ein tilburð frá Formuladystinum í Vági millum VB/Sumba og EB/Streym, har ein leikari hjá EB/Streymi bleiv sligin í andlitið. Nú er spurningurin, hvørjar fylgjur hetta fer at fáa**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Væl dámda ítróttasendingin hjá Sjónvarpinum, 3-2, sum verður send hvørt mánakvøld, var als ikki fyri børn, tá hon bleiv víst á sjónvarpsskíggjum kring landið fyrradagin.

Tá ið brot bleiv víst frá Formuladystinum í Vági, har EB/Streymur var á vitjan hjá VB/Sumba, sá man ein tilburð seint í dystinum, har EB/Streyma-leikarin, Hans Pauli Samuelsen, bleiv sligin í andlitið av venjaranum hjá VB/Sumba eftir sigursmálið, sum EB/Streymur fekk langt inni í yvirtíðini.

Hvat er hent undan sjálvum tilburðinum, har venjarin slær, er ikki enn greitt, men helst hevur venjarin verið bæði óður og harmur um málið, sum EB/Streymur fekk, samstundis sum hann eisini bleiv provokeraður eftir sjálvt málið. Hvussu er og ikki, so kann ein slíkur tilburður ongantíð forsvarast, tí at slíkt hoyrir als ikki heima á einum fótbóltsvølli.

Nú er spurningurin, hvørjar fylgjur hetta fer at fáa.

## Dómarin sá ikki tilburðin

Gleðin var sjálvandi stór á EB/Streyma-leikarunum, tá teir fingu avgerandi málið í Vági, men mitt í allari gleðini bleiv eitt øgiligt rok á miðjum vølli, tá áðurnevndi tilburður fór fram. Hetta endaði við, at ein av útskiftingsleikarunum hjá EB/Streymi fekk gula kortið fyri sín leiklut í rokinum, og so var rokið yvirstaðið, og dysturin bleiv spældur liðugur.

Sum dómarin, Petur Reinert, segði í Sjónvarpinum í gjár, so sá hann ikki henda tilburðin, har leikari bleiv sligin, og tí er ikki væntandi, at nakað fer at standa í dómarafrágreiðingini, sum Fótbóltssambandi fer at fáa.

Tá vit tosaðu við fótbóltssambandið fyri løtu síðani, var heldur eingin klaga komin frá EB/Streymi, og sum skilst frá felagnum í Sundalagnum, so ætla teir ikki at senda klagu inn um tilburðin.

## Fundur í Vági

Vit tóku eisini eitt prát við formannin hjá VB/Sumba, Bjarni Johansen, og hann segði, at teir heldur ikki hava tikið nakra endaliga støðu um tilburðin, sum fór fram móti dystarenda í Vági. Felagið hevði fund um málið í gjárkvøldið, men hvat felagið er komið ásamt um á fundinum, er enn ikki greitt.

Stendur einki í dómarafrágreiðingini, og verður eingin klaga send frá EB/Streymi, so liggur bólturin hjá starvsnevndini í fótbóltssambandinum. Starvsnevndin kann av sínum eintingum taka upp mál, sum hon metir vera neyðug, og so kunnu hesi málini fara til viðgerðar í aganevndini.

Fyri tveimum árum síðani skapti táverandi kappingarnevndin nýtt fordømi í føroyskum fótbólti, tá Bergur Midjord og Jón Johannesen fingu tríggjar daga leikbann eftir ein tilburð í dysti á Tvøroyri. Leikbannini ta ferðina vóru grundað á sjónbandaupptøkur, men seinni sama ár valdi nevndin ikki at brúka somu heimildir í øðrum førum.

Síðani hetta er reglurnar hjá Fótbóltssambandinum broyttar, og nú er tað starvsnevndin, sum hevur heimild at taka slík mál upp. Um teir ætla at taka hetta málið upp, er enn ógreitt.



*Hans Pauli Samuelsen gjørdist sanniliga mittpunktið móti endanum av dystinum í Vági, tá hann bæði legði upp til sigursmálið hjá Arnbirni Hansen og fekk nevan undir vangan frá VB-venjaranum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# B36 skal hanga í oddaliðnum

**B36 skal royna at fylgja við oddaliðnum, NSÍ, tá teir taka ímóti B71 í Gundadali í kvøld. Tí er sigur krav hjá hvíta havnarliðnum. Vinnur B71 hinvegin dystin, so koma teir upp á fimta plássi í formuladeildini**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Í kvøld verður seinni útsetti dysturin frá 17. umfarið, sum skuldi leikast um vikuskiftið, leiktur í Gundadali, har B36 tekur ímóti B71. Undan dystinum liggur B36 á øðrum plássi. Teir skulu tí helst hava ein sigur burtur úr dystinum fyri at hanga í oddaliðnum NSÍ. B71 liggur ikki so væl fyri sum B36. Teir liggja á sjeynda plássi, men vinna teir dystin í Gundadali í kvøld, so kunnu teir smoyggja sær upp á fimta plássið – fram um bæði Skála og GÍ.

## B36 væntar harðan dyst

Hjá B36 stendur væl til við fólki til dystin í kvøld. Hóast onkrir av leikarunum hava smáskaðar at dragast við, so verður sagt úr B36, at allir mans eru tøkir til dystin.

Spælið hjá B36 var sera gott undan summarsteðginum, og megna teir at halda fram við hesum, so vera teir ringir at steðga tað, sum eftir er av kappingini.

Hóast hetta, so væntar ungi miðvallarin hjá B36, Ingi Højsted, ein harðan dyst í Gundadali í kvøld.

- B71 hevur víst, at teir kunnu spæl upp ímóti øllum. Teir eru ringir at hava við at gera, og so eru teir sera sterkir í mótálopunum, so hetta verður heilt víst ikki nakar lættur dystur, sigur Ingi.

Hann leggur tó afturat, at B36 tó ætlar sær at vinna dystin í kvøld.

- Ja, hesin dysturin skal vinnast. Nú vann NSÍ jú um vikuskiftið, so vit skulu helst royna at hanga í teimum uppi í oddinum.

## Eru nøgdir við eitt stig

Hjá B71 sær eisini hampiliga gott út við fólki, men har eru tó ávísir skaðar. Hanus Clementsen hevur leingi verið darvaður av einum álvarsligum knæskaða, og hann verður neyvan at síggja aftur á B71-liðnum í ár. Afturat honum má Jóhannus Jensen sita uttan fyri við skaða til dystin í kvøld.

Símin Hansen hjá B71 sigur seg vænta ein harðan dyst í kvøld, men hann vónar at fáa stig burtur úr dystinum.

- Tað verður ein harður dystur, og vit vera glaðir um vit fáa eitt stig við okkum úr Gundadali. Kunnu vit fáa meir enn tað, so ongantíð betur, sigur Símin Hansen.